

*Sendistova Føroya fær ein nýggjan leiklut, nú hon heldir til í Norðurbryggjuni: Tey trý starvsfólkini á Sendistovuni í Keypmannahavn er frá vinstru: Jannie Bjørgvin, skrivari, Tryggvi Johansen, sendimaður og Brynhild Djurhuus,umsitingarleiðari*

*Framhald av síðu 23*

vorðið ein alt størri partur av virkseminum seinastu árini.

- Serliga undir kreppuni, var tað av týdningi, at vit upplýstu danir um Føroyar, til dømis við fyrilestrum og faldarum, men tað er eisini týdningarmikið at skapa samband við onnur lond – at hava eitt netverk við til dømis sendiharrum úr øðrum londum og skapa good will á tann hátt, sigur Tryggvi Johansen.

Við Norðurbryggjuni broytast uppgávurnar hjá Sendistovu Føroya helst eisini. Hon verður uttan iva sjónligari, nú hon heldur til í Norðurbryggjuni. At skapa eitt netverk í altjóða høpi, verður enn størri partur av virkseminum, men hvat týdningarmesta uppgávan hjá Sendistovu Føroya skal verða framyvir, veit Tryggvi Johansen ikki at siga.

- Tað er ein politiskur spurningur, hvar tyngdin skal liggja, sigur hann og nevnir, at tey møguliga skulu leggja seg meir eftir at samstarva við fjølmiðlarnir ella luttaka sum umboð á ymiskum fundum fyri føroyingar í Føroyum.

Eins og uppgávurnar eru broyttar í hansara tíð, hevur danska áskoðanin á Føroyar og føroyingar eisini verið skiftandi. Luftin var køld fyrst í 90'unum, í kreppuárunum, men tað er ein farin tíð. Hetta seinasta árið er nógv broytt, og í dag hoyrist oftari, at føroyingar eiga at vera stoltir av, at teir hava arbeitt seg burtur úr kreppuni, sigur Tryggvi Johansen.

Umframt at hava arbeitt við sambandinum millum Føroyar og útheimin í nógv ár, hevur Tryggvi Johansen eisini verið undangongumaður, tá tað kom til at skapa samanhald føroyingar millum í Danmark. Saman við Hans Peturi Weihe, sála, var hann sostatt drívmegin aftan fyri Føroyahúsið, sum føroyingar fingu í december 1981. Tryggvi Johansen tók somuleiðis stig til stóra tiltakið "Føroyar í Fokus", sum veruliga setti Føroyar á landkortið í 1985.

## Norðurbryggjan

Norðurbryggjan er mentunar- og umboðsmiðdepil fyri Grønland, Ísland og Føroyar. Tað eru sostatt sendistovurnar hjá Føroyum, Grønlandi og Íslandi, ið húsast á trimum av hæddunum – har leiga tær partar av húsinum út til vinnuligar fyritøkur, vísundaligar og altjóða felagsskapir og mentunarlig tiltøk.

Tað var Morten Meldgaard, leiðari á Dansk Polarcenter, ið fekk hugskotið at gera ein norðurlendskan mentunarmiðdepil á Den Grønlansdske Handels Plads. Hann plagdi at hitta stjóran í Told og Skat, Kaj Elkrog, á bryggjuni, har pakkhúsið hevði staðið tómt í eini 15 ár, eftir at kongaligi grønlendski handilin steðgaði virksemi sínum.

Plássið varð upprunaliga nýtt til samhandil millum Grønland, Ísland, Føroyar, Finnland, Noreg og Danmark, og Meldgaard og Elkrog tosaðu um, at staðið hevði verið vælegnað til ein miðdepil fyri Útnorður og settu niður eina nevnd, sum kundi arbeiða fram ímóti hesum. Fyrrverandi forsetin í Íslandi, Vigdís Finnbogadóttir, varð biðin at verða formaður, og hevur verið ein avgerandi drívmegi í arbeiðinum.

Marjun Hanusardóttir, løgmannstjóri var eisini biðin um at verða við, og hon heitti á Tryggva Johansen at koma upp í arbeiði. Umleið 18 fólk úr Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum arbeiddu sostatt frá mai í 1997 óformelt við at kanna møguleikarnar fyri einum útnorðurmiðdepli, og í september 2000 var grundarlagið undir Norðurbryggjuni tryggjað. Danski staturin váttaði at geva verkætlanini bygningin, sum er umleið 40 milliónir krónur verdur, og grunnurin hjá A.P. Møller: "A.P. Møller og Hustru Chastine Mærsk-McKinney Møllers Fond til Almene Formaal" hevur latið verkætlanini 20 milliónir. Føroyar, Ísland og Grønland fíggja restina av verkætlanini.

Formaður í nevndini fyri Norðurbryggjuna er Vigdís Finnbogadóttir og Morten Meldgaard er stjóri. Norðurbryggjan verður vígd hósdagin 27. november 2003.

SPENNANDI VIRKSEMI
Á NORÐURBRYGGJUNI

Vit fegnast um verkætlanina og gleða okkum at verða partur av hesum norrøna miðdepli, har mentan, gransking og vinnulív virka innan somu veggir.

REPROZ

FØROYA SPARIKASSI



Norðurbryggjan:

# Flaggskip Útnorðurs av bakkastokki í dag



*Vigdis Finnbogadóttir her saman við Stinu Gudmundardóttir, sum herfyri borðreiddi við øllum góðum fyri innbodnum á Norðurbryggjuni*

*Mynd Jan Müller*

**Kjølurin til Norðuratlantisku Bryggjuna í Keypmannahavn, sum skal vera flaggskipið hjá londunum í Útnorði úti í heimi, varð strektur 1. august í fjør. Undan tí liggja nógvar fyrireikingar og tekniarbeiði. Longu 1. november varð flutt inn í pakkhúsini, sum vórðu bygd fyri nærum 250 árum síðani á Den Grønlandske Handelsplads í hjartanum á Keypmannahavn. Í dag verður Norðurbryggjan alment tikin í nýtslu.**

NORÐURBRYGGJAN
*Jan Müller*

Í dag verður 250 ára gamla og risastóra pakkhúsið, nú kallað "Norðurbryggjan" - "Den Nordatlantiske Brygge" í Keypmannahavn tikin alment í nýtslu. Húsið liggur í sjálvum hjartanum av Keypmannahavn og í einum sera søguligum og hugnaligum umhvørvi, í tí stóra pakkhúsøkinum við Christianshavn, betri kent sum Den Grønlandske Handelsplads. Tað var í hesum økinum, at vørur hjá Kongaliga Einahandlinum vórðu goymdar og avskipaðar.

Nú verður so søgan endurnýggjað við innrættingini av einum av teimum risastóru pakkhúsunum. Húsini verða karmur um tey trý londini í Norðuratlantshavi, Føroyar, Ísland og Grønland. Her skal møguleiki vera hjá dønum og øðrum útlendingum at uppliva og fáa innlit í útnorðurmentanina og samfeløgini í Norðuratlantshavi.

Hóast endamálið við húsinum í stóran mun er at skapa áhuga fyri oyggjasamfeløgunum í Norðuratlantshavi millum danir, norðurlendingar og annars teir mongu útlendingar, sum vitja danska høvuðsstaðin, so verður húsið sjálvandi eisini fyri føroyingar, íslendingar og grønlendingar, men tað skal kortini ikki síggjast sum nakar kappingarneyti til eitt nú Føroyahúsið, Íslendingahúsið og Grønlendingahúsið. Martin Fjallstein, leiðari á Føroyahúsinum sær heldur ikki nýggju Norðurbryggjuna, sum nakran kappingarneyta men sær tað heldur sum ein nýggjan møgulekiki fyri føroyingar í Danmark. –Eg velji heldur at síggja Bryggjuna sum flakkskipið hjá londunum í Útnorði, har eisini onnur fólk kunnu fáa innlit í, hvat hetta eru fyri samfelag sigur Martin Fjallastein.

Ein annar føroyingur, sum er spentur at síggja, hvussu hetta fer at eydnast, er føroyski presturin í Keypmannhavn, Bergur Jacobsen. Hann heldur húsini kunnu vera við til styrkja samanhaldið millum føroyingar. -Tá eg fór niður í 64 sigldi Tjaldið 14. hvønn dag. Tá var samanhald millum føroyingar. Nú er flutningur aftur og fram hvønn dag. Tey flestu hava ráð til at hava samband um telefonina, og tey ungu hava internetið og kunnu fáa tíðindi og bløðini á netinum hvønn dag. So alt tað arbeiði, sum var millum føroyingar tá í Keypmannahavn skal kanska strukturerast umaftur. Og tað kann eisini hava nakað við framtíðina hjá føroysku kirkjuni og Føroyahúsinum at gera. Við hesum brillum heldur Bergur Jacobsen eisini, at tað er týdningarmikið, at føroyingar við hesum húsunum kunnu fáa eitt gott andlit úteftir. Hann er nú sera spentur at síggja, hvussu nýggja húsið fer at taka seg út.

### Vígdis gjørdi ætlan livandi

Í dag verður tað so m.a. Vígdis Finnbogadóttir, formaður fyri grunnin, sum umsitur húsini, sum fer at ódeyðiliggera hesi fleiri hundrað ára gomlu húsini. Men hvat heldur hon um tiltakið og hesa spennandi verkætlan, sum hon sjálv hevur lagt lív og sál í. Tað fingu vit innlit í, tá hon á eini samkomu fyri innbodnum, gav sítt boð uppá verkætlanina "Norðurbryggjan".

Hon vísti á, at tað vóru tveir persónar, sum í 1997 fingu hugskotið til ein Norðuratlantiskan Mentanarmiðdepil í Keypmannahavn. Teir vóru Kaj Elkrog, fyrrv. stjóri í Told og Skat og Morten Melgaard, táverandi stjóri í Dansk Polarsenter. Hesir báðir hava gjørt eitt framúr gott arbeiði fyri at fáa sett húsini í stand aftur, og tað skylda vit teimum eina stóra tøkk fyri. Vígdis Finnbogadóttir endurgav í hesum sambandi eitt franskt orðatak, sum sigur, at "bert tey, sum fáa eyguni upp fyri tí ósjónliga, eru før fyri at gera tað ómøguliga".

- Takka verið stuðuli frá nógvum síðum mótvegis londunum í Útnorði, kunnu vit nú síggja fram til, at ein dreymur gerst veruleiki. Myndugleikarnir í Danmark, Føroyum, Íslandi og

*Framhald á næstu síðu*